

**SUZUKI GRAND VITARA 2.5 BENS.** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** NA 753 **Km:** 48.000
**Árgangur:** 26.07.2005
**Útgjald:** 36.250 **Mðr. gjald:** 2.273 (5 ár)

**kr. 145.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1.6 SEDAN** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** MN 261 **Km:** 12.000
**Árgangur:** 01.06.2007
**Útgjald:** 46.300 **Mðr. gjald:** 3.000 (5 ár)

**kr. 185.000,-**



**FORD MONDEO 2.0 TDCI 130 HK** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** BM 231 **Km:** 150.000
**Árgangur:** 25.10.2002
**Útgjald:** 27.000 **Mðr. gjald:** 2.659 (3 ár)

**kr. 108.000,-**



**PEUGEOT 1007** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** UH 547 **Km:** 29.000
**Árgangur:** 09.03.2006
**Útgjald:** 27.000 **Mðr. gjald:** 1.750 (5 ár)

**kr. 108.000,-**



**TOYOTA RAV 4 2.0 VVT-I 4X4** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JG 132 **Km:** 55.000
**Árgangur:** 03.02.2005
**Útgjald:** 52.000 **Mðr. gjald:** 3.310 (5 ár)

**kr. 208.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 1.8 STC. SOL** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** LM 312 **Km:** 71.000
**Árgangur:** 24.03.2004
**Útgjald:** 37.000 **Mðr. gjald:** 3.301 (3 ár)

**kr. 148.000,-**



**TOYOTA AURIS 1.6 LUNA** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** BS 075 **Km:** 7.000
**Árgangur:** 21.05.2007
**Útgjald:** 46.000 **Mðr. gjald:** 2.900 (5 ár)

**kr. 184.000,-**



**COROLLA 1.4 D-4D LUNA DIESEL** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** EB 788 **Km:** 83.000
**Árgangur:** 09.03.2005
**Útgjald:** 36.500 **Mðr. gjald:** 2.288 (5 ár)

**kr. 146.000,-**



**HONDA CIVIC 1.6 SEDAN** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** MB 923 **Km:** 89.000
**Árgangur:** 08.05.2003
**Útgjald:** 21.250 **Mðr. gjald:** 2.090 (3 ár)

**kr. 85.000,-**



**AVENSIS 2.0 D-4D TERRA DIESEL** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JK 958 **Km:** 90.000
**Árgangur:** 25.06.2003
**Útgjald:** 39.500 **Mðr. gjald:** 3.840 (3 ár)

**kr. 158.000,-**

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, i eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F




*Maðurin, sum skeyt við luftbyrsu eftir einum bili týsdagin, varð leyslatin fríggjadagin*

# Luftbyrsumaðurin leyslatin

27 ára gamli maðurin, sum í seinastu viku skeyt ein bil í R.C. Effersøesgøtu í Havn, varð leyslatin fríggjadagin

Tað var ikki mett, at neyðugt var at halda 27 ára gamla manninum í arrestini longur, og tí varð maðurin, sum týsdagin skeyt rútin á einum bili í R.C. Effersøesgøtu í Havn, leyslatin um vikuskiftið.

Sambært løgregluni eru allir partar í málinum avhoyrdir, og tað er staðfest, at svartsjúka var orsøkin til, at maðurin – sum í rættinum greiddi frá, at heimurin hjá honum var brotin saman, nú daman var farin frá honum – skeyt eftir bilinum hjá einum manni, sum hevði havt ávíst samband við fyrrverandi unnustuna hjá 27 ára gamla manninum.

Hann greiddi eisini frá, at hann var á rondini til nervasamanbrot.

Løgreglan veit nú, hvussu leikur fór fram, og hóast kanningararbeiðið ikki er heilt liðugt, so var ongin orsøk at halda 27 ára gamla handtiknan longur.

Eisini er greitt, at onkur av teimum fýra monnunum ætlaði at rýma við einum fiskiskipi, tá teir høvdu skotið, men at hetta bleiv av ongum, og skipið varð tí seinkað til fiskiskap. Men hetta vil løgreglan hvørki vátta ella avsanna.

Revsiramman er fýra ár, men helst verður revsingini ikki so hørð, hóast tilburðurin kundi verið vandamikil, um umstøðurnar vóru eitt sindur øðrvísi.

**-eij**

# Rúni Olsen nýggjur Maritimur leiðari á Smyril Line



Rúni Olsen, 42 ár, hevur tikið við starvinum sum Maritimur leiðari á P/F Smyril Line, har hann hevur ábyrgdina av rakstrinum av M/F Norrönu, sum nú siglir á rutuni millum Danmark, Føroyar og Ísland. Rúni Olsen hevur, áðrenn hann kom til P/F Smyril Line, starvast hjá reiðarínum J. Lauritzen A/S sum Nautiskur KT leiðari.

Rúni Olsen er føddur og uppvaksin í Klaksvík og er útbúgvin skipsførari frá Tórshavnar Sjómansskúla í 1995. Hann hevur áður siglt sum m.a. navigatørur í Western Geophysical, Mercandia og Lauritzen Kosan.

Í 2001 starvaðist hann sum rutuvegleiðari á Danmarks Meteorologiske Institut DMI. Meðan hann var í starvi hjá DMI tók hann samstundis læraraútbúgving á læraraskúlanum, Skovlunde dag og aftan seminar, áðrenn hann í 2006 bleiv settur í starv sum Nautiskur KT leiðari í reiðarínum J. Lauritzen A/S.